DAGSINS MEINING

Løgmaður í Bretlandi

Í farnu viku var Anfinn Kallsberg, løgmaður á almennari vitjan í Stórabretlandi. Innbjóðingin frá Tony Blair, forsætisráðharra er skjótt tvey ára gomul. At hon hevur verið útsett fleiri ferðir man uttan iva vera av fleiri orsøkum. Bæði tað at bretskir ráðharrar hava havt so nógv um at vera, og síðani tær drúgvu samráðingar, sum hava verið millum Danmark og Føroyar seinastu árini.

Tað er ikki gerandiskostur, at føroyskur løgmaður er á almennari vitjan í londunum uttan fyri Norðurlond. At leiðin skuldi ganga til Bretlands er heldur ikki so løgið, tá hugsað verður um, at hetta stóra land er okkara næsti granni umframt ein av okkara mest týðandi handilspartnarum.

Undir vitjanini, har løgmaður hitti bæði skotskar og bretskar ráðharrar, var tað serstakliga fiskivinnan, sum varð umrødd og má sigast, at løgmaður fekk umrøtt nógvar týðandi fiskivinnuspurningar við ráðharrarnar. Eitt nú heitti løgmaður á bæði skotar og bretar um at stuðla okkum í ynskinum um at fáa hækkað loftini fyri útflutningi av bæði fiskafóðuri og rækjum til ES. Spurningurin um felags fiskastovnar varð eisini á borðinum, og her mælti løgmaður til, at føroyingar og bretar draga eina línu í ásetanina av svartkjaftakvotu.

Nú ein komandi oljuleiting stendur fyri framman bæði á føroyskum og bretskum øki var tað eisini náttúrligt at taka henda vinnutáttin upp. Bretski orkumálaráðharrin lovaði løgmanni, at teir vildu hjálpa føroyingum, soleiðis at vit kundu byggja upp eina oljuvinnu uttan tey stóru mistøkini teir høvdu gjørt. Her var eisini hugsað um negativu árinini av eini oljuvinnu.

Í hesum sama høpi var eisini spurningurin um ognarrættin til tær stóru leiðirnar sunnan fyri Føroyar og vestan fyri Bretland til umrøðu. Bretski varauttanríkisráðharrin helt fyri, at rætt var um serfrøðingar úr báðum londum settu skjøtil á málið, nú ikki færri enn fýra lond gera krav uppá økið. Hann fegnaðist um, at markið innan fyri 200 fjórðingar varð ásett, og metti tað at vera av stórum týdningi fyri framtíðar íløguhugin hjá oljufeløgunum, at eisini markið uttan fyri 200 fjórðingar kom uppá pláss. Undir vitjanini varð eisini skipað fyri móttøku, har umboð fyri føroyskt og bretskt vinnulív, her bæði fiskivinnu- og oljuvinnu, kundu hitta hvør annan. Á tí móttøkuni vórðu fleiri at oddafólkunum í bretskari oljuvinnu.

Samanumtikið varð vitjanin hjá løgmanni í Bretlandi væleydnað og vónandi ein nýggj byrjan í viðurskiftunum millum londini.

Sosialurin

NØVN Í VIKUNI

Alexandur starvsløn í trý ár

Fyrsta trý ára starvsløn, sum Mentanargrunnur Landsins letur, fer til Alexandur Kristiansen. Í trý ár fer hann at arbeiða við sjónleiki og yrkingum

MENTAN
Birgir Kruse

Skúlaárið 1997-98 var Alexander Kristiansen vikarur á Kirkju. Her sæst hann á lendingini saman við konuni Karolinu Matras. Í baksýni Másin

Mynd: Eirikur Lindenskov

Týsdagin gjørdi nevndin í Mentunargrunni Landsins av, at Alexandur Kristiansen fær trý ára starvsløn, við støði í reglugerð grunsins. Tvær eitt ára starvslønir vórðu eisini latnar. Onnur fer til Hanus Kamban.

Alexandur Kristiansen er lærari í Fuglafirði og er kendur sum ein av bestu týðarum okkara, tá umræður yrkingar. Av týðingum kunnu nevnast Lógvalestur í 1996, Anadyomena í 1997 og Veingir, sum kom í fjør.

Sjálvur hevur Alexandur eisini givið út egin yrkingasøvn m.a. Staksteinar í 1990 og Odysseus í hjartanum árið eftir.

Sangbókin Kannubjølluvísur frá 1977 varð útseld beinanvegin og fyrrárið kom fløgan við sangum frá Grísaflísa Pæturi, sum upprunaliga komu út í bók í 1992.

Tá Føroya Lærarafelag, eitt av elstu fakfeløgum í landinum, fylti hundrað, skrivaði Alexandur kantatu til felagið. Pauli í Sandagerði tónsetti og framførslan var í Læraraskúlahøllini í oktober 1998. Í bókini, sum lýsir hundrað ára søgu Lærarafelagsins, er teksturin prentaður.

Í stuttum viðtali mikumorgunin sigur Alexandur úr Fuglafjarðar skúla, at hann aldri hevði roknað við hesum. – Væntaði kanska okkurt, sigur hann, Men hetta hevði eg ikki trúð. Eg ætli mær at fáa okkurt skrivligt frá hondini, sigur Alexandur lítillátin. – Sjónleikur og egnar yrkingar, verður tað.

– Lesi beint nú leikin um Nólsoyar Páll, sum Steinbjørn skrivaði til leikritakappingina. Eg ætli at fara longur aftur í tíðina , heilt aftur til Alexandur Mikla. Hann var eitt genialt mennisksja, sigur navnin í Fuglafirði. – Uppá ymsar mátar. Hann stuðlaði granskning í gamla Grikkalandi, og tað ætli eg mær í leikinum at binda eitt sindur saman við okkurt í nútíðini. Altso, skifta millum tað heilt gamla og so nútíðna.

Hugskotið til henda sjónleik um Alexandur Mikla fekk eg, tá kapping varð útskrivað nakað herfyri, sigur Alexandur. – Longu tá byrjaði eg at hugsa um at vera við í kappingini, men eg kom aldri so langt og luttók ikki, men hugskotið fekk eg tá, sigur Alexandur.

Eg gjørdist púra ovfarin, sigur Alexandur um boðini, hann týskvøldið fekk frá formanninum í Mentunargrunni Landsins. – Eg havi ikki fata tað ordiliga enn. Og so er hetta eitt ordiligt álit at fáa, skoytir hann uppí úr skúlanum í Fuglafirði, har tey jást nú hava roynd. – Og hetta verður so mín roynd, at royna at liva upp til tað álit, eg havi fingið. Tað havi eg so 3 ár til at prógva.

Rithøvundurin Hanus Kamban fær starvsløn í eitt ár. Hann hevur verið í Danmark eitt skeið og flytir nú heim aftur. Hanus fer fyrst og feremst at skriva um skaldið H. A. Djurhuus.

Umframt Hanus, fær ein annar føroyingur stravsløn í eitt ár. Allar hinar játtaninar eru fyri stytri tíðarskeið, frá hálvum árið til tveir mánaðir.

Tilsamans 37 umsóknir vórðu viðgjørdar á fundinum týsdagin og samlaða upphæddin at lata út varð hálv onnur millión. Mánaðarløn til tey, sum søkja starvsløn, verður sett eftir læraralønunum í fólkaskúlanum á lønarstigi 21. Henda mánaðarupphæddin er í løtuni 17.876,26. Starvsløn í eitt ár svarar til 214.515,12 kr og starvsløn í 3 ár svarar til 643.545,36.

Søkjast kann um starvsløn frá Mentunargrunni Landsins einaferð um árið. Formaður í grunninum er Rói Patursson og skrivari er Paulivar Andreasen.

Sosialurin ynskir Alexanduri, Hanusi og teimum, sum eisini hava fingið lut í fyrstu starvslønum landins tillukku og góða eydnu.

Sosialurin

Sosialurin
Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri:
Jan Müller jan@sosialurin.fo
Blaðstjóri:
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
Tíðindaleiðari:
Justinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
Marknaðardeild: lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Marjun Dalsgaard marjun@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Blaðfólk:
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
John Johannessen john@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjelbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Mentan:
Birgir Kruse birgir@sosialurin.fo
Ítróttur:
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Myndamenn:
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Sosialurin í Norðoyggjum:
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
Útgevari/uppseting:
Sp/f Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla:
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
Postadressa:
Postboks 76, 110 Tórshavn
E-mail:
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

Lýsingar

Freistir:	Tekstlýsingar	Størri lýsingar	Lýsingartorgið	Heilsanir
Týsdagsblaðið	Mán.kl. 10	Frí. kl. 15	Frí. kl. 12	Frí. kl. 12
Mikudagsblaðið	Týs. kl. 10	Mán. kl. 15	Mán. kl. 12	Mán. kl. 12
Hósdagsblaðið	Mik. kl. 10	Týs. kl. 15	Týs. kl. 12	Týs. kl. 12
Friggjadagsblaðið	Hós. kl. 10	Mik. kl. 15	Mik. kl. 12	Mik. kl. 12
Leygardagsblaðið	Frí. kl. 10	Hós. kl. 15	Hós. kl. 12	Hós. kl. 12

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

Stødd:
Ein heil síða í Sosialinum er 254mm breið og 346mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Ein heil síða í Sosialinum er 254mm breið og 348mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

Brimil til Havnar leygardagin

Í gjáramorgunin bendi alt á, at Brimil loysir úr Noregi seinnapartin í dag. Í morgin fer tað at bera til hjá fólki at síggja tað avbera snotiliga skipið

–Ætlanin er at fara úr Noregi í morgin og at leggja at í Havnini leygarmorgunin

BRIMIL
Áki Bertholdsen

Nú kemur nýggja vaktar- og bjargingarskipið, Brimil, loksins til Føroya.

Av Vaktar og Bjargingartænastuni verður upplýst, at ætlanin er at fara úr Noregi seinnapartin í morgin og at koma á Havnina leygarmorgunin.

Síðani Løgtingið i farnu viku avgjørdi lønartrætuni hjá skipara og stýrimanni á Brimli við lóg, eru yvirmenninir farnir yvir, og hesa vikuna hava teir gjørt klárt at loysa. Annars hava nakrir av manningini verið í Noregi alla tíðina og hildið skipið viðlíka.

Tað var alla tíðina greitt, at tað fór at taka nakrar dagar at gera skipið siglingarklárt, tí nú tað hevur ligið í meiri enn fýra mánaðir, skal útgerðin og allar skipanir umborð gjøgnumgangast av nýggjum, fyri at fáa vissu fyri, at alt riggar, sum tað skal, áðrenn loyst verður.

Johan Simonsen á Vaktar- og Bjargingartænastuni, segði í gjáramorgunin, at alt vísti seg seg rigga sum tað skuldi og at miðað verður eftir at verða í Føroyum leygardagin.

Móttøka umborð

Eftir ætlan skal Brimil koma til Havnar klokkan 10 leygarmorgunin.

Vaktar og Bjargingartænastan sigur, at tá er tað ætlanin, at tað skal bera til hjá almenninginum at koma umborð at síggja skipið.

Havnar Hornorkestur fer at spæla, tá ið Brimil leggur at, og onkrar røður verða hildnar, eitt nú fer fiskimálaráðharrin at halda røðu.

Men annars er ikki ætlanin at gera so nógv burturúr at Brimil kemur, nú hann er so nógv seinkaður. Brimil var liðugur seinast í oktober og tá var var ætlanin, at hann skuldi sigla bygd av bygd, so at fólk skuldu fáa høvið at síggja nýggja flaggskipið hjá Vaktar- og Bjargingartænastuni. Men tað verður nú av ongum, í hvussu so er fyri fyrst.

Nú, hann er so nógv seinkaður, er ætlanin at fáa hann í tænastu sum skjótast.

Johan Smimonsen sigur, at nú Brimil er komin, skal Tjaldrið á beding at gera ymsar umvælingar og til eftirsýn.

Hetta skuldi verið gjørt, men er útsett inntil Brimil kom.

Tá ið Brimil kemur, er hetta fyrstu ferð síðani Ólavur Halgi varð seldur í 1997, at arbeiðið hjá Vaktar- og bjargingartænastuni liggur í eini fastari legu. Síðani Ólavur Halgi varð seldur, hevur talan bara verið um lappaloysnir, sum ikki hava verið nøktandi. Fyrst varð Nim leigað, men hon varð vrakað, tí tað larmaði ov illa umborð. Síðani varð Gorm leigaður, men hansara virkisøki var avmarkað, tí hann var so lítil. Tí var tað kærkomið, at Brimil varð bygdur.

Ellintur umborð aftur á Tjaldrið

– Hann skal mynstra umborð á Tjaldrinum í dag, men hann hevði vónað at hann slapp við Brimli

MYNSTRING
Áki Bertholdsen

Ellintur Abrahamsen fer nú aftur umborð á Tjaldrið, men hann hevði vónað at fingið kansin við Brimli

Nú fer Ellintur Abrahamsen, formaður í Skipara-og Navigatørfelagnum aftur til sjós.

Hann er skipari hjá Vaktar- og Bjargingartænastuni og í dag skal hann mynstra sum skipari umborð á Tjaldrinum.

Hann viðgongur, at hann er eitt sindur vóbrotin av, at hann ikki fekk møguleikan umborð á nýggja skipinum, Brimli.

Hann vísir á, at skipið, sum hann var skipari á Ólavur Halgi, var skipið, sum varð lagt, tá ið Brimil skuldi byggjast.

Hann hevur siglt við Vaktar- og Bjargingartænastuni í 25 ár og tí er hann eitt sindur vónsvikin av, at hann ikki fekk kansin við Brimli.

Eg havi siglt við øllum einum gonlu skipunum hjá teimum og eftir so nógv ár í tænastuni, hevði eg vónað at sloppið umborð á eitt nýtt skip, sigur hann.

Skiparar á Brimli vera Óla Jákup Muller og Jan Christoffersen.

Nevndin ikki sett

Enn er nevndin ikki sett, sum skuldi ásta lønina hjá skiparunum og yvirmonnunum umborð á nýggja vaktar og bjargingarskipinum, Brimli.

Tað var í farnu viku, at Løgtingið samtykti at enda tað fimm mánað lngu trætuna um lønina hjá skiparunum og stýrimonnunum á Brimli við lóg.

Løgtingið avgjørdi at tað skal setast ein fýra manna nevnd, sum skal áseta lønina. Fíggjarmálastýrið og Skipara- og Navigatørfelagið skulu velja hvør sínar tveir limir í nevndina. nevndin skal vera liðug 1. mai.

Semjast nevndarlimirnir ikki um lønina, skulu teir velja ein uppmann at skera ígjognum. Semjast teir ikki um uppmanninm , skal sorinskrivarin útnevna hann.

STH

Heilsa, **T**rygd og **U**mhvørvi - **HTU**

Útbúgvingarskrá í 5 modulum.

- **Modul 1:** Kunning um lóggávuna um heilsu, trygd og umhvørvi í leitiskeiðinum

Endamálið við skeiðinum er at geva luttakarunum innlit í mest týðandi partarnar av regluverkinum,ið stýra heilsu, trygd og umhvørvi í kolvetnisvinnuni á føroyska landgrunninum, t.e. løgtingslógin um kolvetnisvirksemi, viðmerkingarnar til útbjóðingarlógina o.a. Nomið verður við samspælið ímillum krøvini, sum myndugleikar seta HTU og eginkrøvini, ið oljufeløgini seta til HTU og hvussu hesi krøv eisini gerast galdandi fyri veitararnar hjá oljufeløgunum.

Skeiðið er skipað í samstarvi millum Føroya Handilsskúla og Handilsskúlan BI í Stavanger.

Innihald:

- Gongdin at fyrireika oljuleiting á føroyska landgrunninum
- Rættarliga reglugeringin av kolvetnisvirkseminum í fólkarættarligum høpi
- Loyvisskipanin í regluverkinum, standardloyvi, heimildir hjá løgtinginum og landstýrismanninum
- HTU-hugtakið í Føroyum og grannalondunum, hugtøk og prinsippir
- HTU-lóggávan, ymiskir hættir at regulera HTU
- Hvør hevur ábyrgd av, at virksemi er ráðiligt við atliti at HTU
- Virðishugtøk í sambandi við oljuvirksemi
- Tilbúgving, greiningar, ætlanir, tiltøk og fráboðan
- Uppgávu- og ábyrgdarøkið hjá myndugleikunum á HTU-økinum
- Krøv til eftirlit við HTU
- Løgfrøðiligir møguleikar at stýra HTU

Dagar: 27.,28.,29. og 30. mars 2001. Allar dagar: kl. 09.00-16.45
Skeiðleiðari: Anna á Hædd, løgfrøðingur í Oljumálastýrinum
Kostnaður: Kr. 2.000,00 fyri hvønn, íroknað frálæru, tilfar og mat.
Tilmelding: Í seinasta lagi 20. mars 2001

Skeiðið er ætlað øllum, ið ætla sær at starvast innan frálandavinnuna og teimum í starvast innan vinnur, ið ætla sær at veita tænastur til frálandavinnuna. ***Vert er at geva gætur, at eitt av 5 krøvum til virkir, sum ætla sær í oljuvinnuna, er at tey skulu hava eina skipan við atliti at heilsu, trygd og umhvørvi.***

SKEIÐTÆNASTA HANDILSSKÚLANS * STH
Tel: 318813, Fax: 313374, T-postur: fh-sth@post.olivant.fo